# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Amerikanarar stuttleika sær við at gera gjøldur burtur úr okkara forfedrum*

*(iranskur talsmaður)*

# Undirsjóvartunnil millum Evropa og Afrika

**Gongst sum ætlað, byrjar arbeiðið at gera tunnil undir Gibraltarsundinum næsta ár**




Bæði í Spania og Marokko er politiskur vilji til at fullføra verkætlanina, sum er mett at kosta einastaðni millum 50 og 75 mia. krónur. Ætlanin er, at arbeiðið skal byrja afrikonsku megin sundið. Tunnilin verður 38,6 kilometrar langur, og einastaðni verður hann heilar 450 metrar undir vatnskorpuni.

Maðurin, sum er komin við hugskotinum, er sveisiski verkfrøðingurin Giovanni Lombardi. Hann hevur verið uppi í fleiri tunnilsverkætlanum í Alpunum, men ásannar, at ein undirsjóvartunnil millum Afrika og Evropa hevði verið hansara størsta avbjóðing.

– Einki kann samanberast við hetta, tí her eru so nógvar avbjóðingar. Í fyrsta lagi er tað dýpið, tí í støðum er dýpið í Gibraltarsundinum einar 170 favnar. Tað er fimm ella seks ferðir meiri enn í Ermasundi, har Eurotunnilin er, sigur sveisiski verkfrøðingurin við BBC.

Hann vísir á, at ætlanin um tunnil undir Gibraltarsundinum er eisini ein stór jarðfrøðilig avbjóðing, tí tað er næstan altíð røringur í, har evropeiska og afrikanska meginlandsstøðið møtast.

Tankin um ein undirsjóvartunnil millum Evropa og Afrika er frá áttatiárunum, men hann hevur ongantíð verið tikin í álvara fyrr enn nú.



*Filmurin „300“ er sálarligur ágangur ímóti Iran og iranska fólkinum, sigur stýrið í Teheran*

## Filmur partur av stríðnum millum USA og Iran

Iranar eru í øðini inn á filmin „300“, sum lýsir bardagan við Thermopylae.

Í bardaganum við Thermopylae í Grikkalandi megnaðu 300 hermenn úr Sparta at steðga persiska herinum, sum taldi 100.000 mans. Hetta var í árinum 480 fyri okkara tíðarrokning.

Táverandi persaríki var har, sum Iran er nú, og iranar ivast ikki í, at filmurin er partur av amerikanska ágangnum ímóti Iran, sum sagt verður. Í gjár skrivaði eitt av teimum størstu iransku bløðunum, at Hollywood hevur sent Iran krígsavbjóðing.

- Í filminum verða okkara forfedrar lýstir sum ljótir og villir drápsmenn, skrivaði blaðið.

Talsmaðurin hjá iranska forsetanum hevur eisini funnist at amerikanska filminum. Jawal Shamaghdari segði, at amerikanarar kunnu eftir øllum at døma stuttleika sær við at gera gjøldur burtur úr søguni hjá Iran. Hann legði afturat, at „300“ er enn ein partur av tí sálarliga ágangin um ímóti Iran og iranska fólkinum.

## Ógvuslig ferðsluvanlukka

**Fimm fólk doyðu, tá 13 bilar stoyttu saman á einum høvuðsvegi í Florida í gjár**

Sambært løgregluni í Florida var tað tjúkt í mjørka, tá teir 13 bilarnir stoyttu saman. Í samanstoytinum vóru millum annað ein sløkkiliðsbilur og ein løgreglubilur, sum vóru á veg at veita hjálp í sambandi við eitt ferðsluóhapp.

Fimm fólk doyðu í samanstoytinum, og fýra vórðu flutt á sjúkrahús. Løgreglan noyddist at steingja høvuðsvegin í fleiri tímar, áðrenn øll vrakini vóru fingin av vegnum.



*Ein løgreglubilur og ein sløkkiliðsbilur vóru við í samanstoytinum*

## STUTT SAGT

### Forsetin heimaftur

Irakski forsetin, Jalal Talabani, kemur aftur til Irak í dag eftir at hava leitað sær heilsubót í grannalandinum Jordan. Talabani fór við flogfari úr Irak tann 25. februar, og alment varð sagt, at hann hevði overvað seg og trongdi til at hvíla seg eina tíð. Onnur vildu vera við, at forsetin hevði havt trupulleikar við hjartanum, men tað avsannaði skrivstova hansara. Tann 74 ára gamli Jalal Talabani, sum er kurdi, hevur verið irakskur ríkisleiðari síðani apríl í 2005. Sum forseti hevur hann ógvuliga avmarkað vald, men kortini verður hildið, at hann hevur stóra ávirkan á hinar iraksku leiðararnar og á USA.

### Sálarsjúkir hermenn

Kanningar vísa nú, at fjórði hvør amerikanari, sum hevur gjørt hertænastu í Irak ella í Afghanistan, hevur sálarligar trupulleikar at dragast við. Kanningarnar umfata 104.000 mans, sum gjørdu hertænastu í tíðarskeiðinum frá 2001 til 2005. Sambært CNN hevur kanningarúrslitið skelkað amerikonsku herleiðsluna, og kanningarnar staðfesta eisini, at menn, sum koma aftur úr hertænastu, fáa als ikki ta hjálp, sum teir sambært lógini hava rætt til. Hetta seinasta hevur longu kostað ráðharranum Francis Harvey sessin, og tað sama hendi einum av teimum ovastu hernaðarleiðarunum.

### ETA-menn tiknir

Franska løgreglan tók í gar tríggjar limir í baskiska loysingarfelagsskapinum ETA. Menninir vórðu tiknir í franska býnum Hendaye, eftir at spanska løgreglan hevði fingið frænir av, at teir vóru har. Ein av teimum tiknu hevur sitið fimm ár í fongsli fyri harðskap og yvirgang, men slapp leysur í fjør. Hinir báðir verða settir í samband við fleiri atsóknir í nítiárunum. Sponsku myndugleikarnir siga, at teir báðir vóru í einari serligari álopsdeild, sum ETA hevði frá 1994 til 1997.